# B68 eigur at verða tikið fyri fult

**Tað er ilt at ímynda sær, at HB og Skála fara at verða flutt frá ávikavíst fremsta og aftasta plássinum**

SAMANUM 12. UMFAR
*Jóannes Hansen*



*Sum úrslitini hava lagað seg eftir summarsteðgin, so tykist tað fyrst og fremst vera toftamenn, sum teir í HB skulu hugsa um*

Ein triðingur er eftir at landskappingini. HB vann væntaða sigurin á Skála. Harvið staðfesti HB sera trygga oddasessin. Teir eru fýra stig frammanfyri B68. Tað vil siga, at tað skulu í hvussu so er tvey umfør til, áðrenn tað kann hugsast, at nakar kann hótta HB. Tí kunnu vit ikki annað enn endurtaka útsøgnina frá fyri viku síðani um, at tað er rættuliga nógv, sum bendir á, at HB verður fyrsta felagið síðani GÍ í 1996, sum fer at megna at vinna FM heitið tvey ár á rað.

Skála er aftast, og tað skulu í hvussuso er tvey umfør til, áðrenn teir kunnu sleppa av plássinum, sum ber beinleiðis niðurflyting við sær. Teir hava einki fingið burturúr tveimum teimum fyrstu umførunum eftir summarsteðgin, meðan VB, sum í summarsteðginum var næstaftast, hevur fingið seks stig burturúr, soleiðis at FSV nú orduliga hevur yvirtikið næstaftasta plássið.

HB hevur fingið fult í tveimum umførum, meðan B36, sum í summarsteðginum var oddalið, einki hevur fingið burturúr. Tað luktar rættuliga av, at ballið er buðið hjá B36, sum noyðist at smyrja seg við, at steypasigurin verður einasta atgongumerkið hjá teimum til altjóða fótbólt komandi summar.

## B68 er væl við

Mest merkisvert av øllum er tað, at B68 sunnudagin megnaði at taka enn eitt fet ímóti toppinum. Í summarsteðginum var B68 fjórða árið á rað á fjórða plássinum. Tað vóru teir ikki heilt misnøgdir við, men teir mettu vánir vera fyri at røkka eitt vet longri upp. Eftir 11. umfarið vóru teir á triðja plássinum, og nú eru teir nummar tvey. At B68 megnaði at koppa B36 í Gundadali er sjálvandi merkisvert.

Undan kappingarbyrjan varð spátt, at B68 fór at fáa eitt tað torførasta kappingarárið, síðani teir í 1981 komu í 1. deild. Tað varð roknað við, at B68 skuldi vera við í stríðnum fyri at sleppa undan niðurflytingini, men nú eru teir við í stríðnum um heiðursmerkini og Europa Cup luttøkuna. Um tað fer at eydnast teimum at hótta HB og harvið at vera við í kappingini um FM heitið, sum teir ikki hava vunnið síðani 1992, fæst at síggja næstu vikurnar. Annan sunndag skal B68 spæla á heimavølli ímóti KÍ, so skulu teir til Miðvágs, har teir skulu royna at hevna tapið, ið er orsøkin til, at B68 ikki er heilt tætt undir HB, og so skulu teir spæla lokaluppgerð ímóti NSÍ, áðrenn stóra lykladystin í Gundadali ímóti HB. Um tað fer at ganga, sum tað hevur gjørt higartil, so kann tað fara at vísa seg, at dysturin ímóti HB fer at gera FM heitið av.

Toftamenn eru skemtiligir og ikki sørt speiskir. Teir hugna sær við, at teimum varð spátt so vánaligt kappingarár, og at teir nú eru næstovastir. Onkur hevur tikið til, at nú eru teir komnir so mikið høgt upp, at útvarpið aftur kann væntast á vitjan, uttan at gestirnir nýtast at vera oddalið. Og so mugu teir í útvarpinum fara atgera lektir og læra seg nøvnini á B68 spælarunum, soleiðis at tað ikki bara verður ein toftamaður og B68ari ímóti Jens Kristian Hansen, John Petersen, Klæmint Matras og so víðari, skemta teir á Toftum.

## Altjóða luttøkan

Ofta plagar at verða tikið til, at altjóða ferðirnar í august hava við sær, at liðini verða so mikið nógv órógvað, at tey missa í heimligu kappingini. Í hesi vikuni skulu bæði NSÍ og KÍ spæla ímóti norskum liðum. Orsaka av landsdystinum mikukvøldið í næstu viku verður ikki spælt í landskappingini nú sunnudagin. Tað ber við sær, at klaksvíkingar rættuliga sleppa undan stressinum frá altjóða fótbóltinum.

Bæði NSÍ og KÍ vunnu sunnudagin. Avrikið í Runavík var einki serligt. Hjá KÍ glapp tað við málskjótingini. KÍ liðið hevur framvegis nagativan málmun, ment eir eiga nú toppskjúttan í landskappingini.

GÍ hevur ongan brodd í álopinum. Sum hjá so mongum øðrum hevur tað víst seg, at hópurin er ikki nóg breiður. Tá ið lyklaspælarar eru skaddir ella leikbannaðir gongur tað ikki. HB megnaði undan summarsteðginum at koma væl undan tíðarskeiðnum, tá ið fleiri at teirra føstu monnum vóru burturfrá. Nú hava teir alt fólkið tókt – og teir hava nógv fólk – og tí skal vilja illa til, um teir ikki vinna FM heitið. Men nú eru tað toftamenn, sum eru teir næstu til at gera av, um HB skal fara einsamalt avstað ella ikki.



# IM-normur til John Arna

**Hóast bert 8 av teimum 13 umførunum í Budapest eru leikt, hevur skopuningurin longu nú tryggjað sær normin**

TALV
*Jákup Mørk*

Í hesum døgum tekur John Arni Nilsen lut í stóru kappingini, 1st Saturday í Budapest.

Hetta er ein kapping, við luttøku av sterkum telvarum, og hóast tað enn er nakað eftir, áðrenn kappingin er liðug, so er longu nú greitt, at John Arni hevur rokkið sínum næsta IM-normi.

Fyri at røkka hesum skuldi John Arni hava 6,5 stig eftir níggju umfør, og longu eftir 8 umførum er greitt, at hetta mál er rokkið.

Í alt eru 13 umfør, so enn resta fimm dystir, men í løtuni er føroyski telvarin á fremsta sessinum í kappingini.

Sostatt hevur John Arni nú vunni ðsær tveir av teimum trimum normunum, sum skulu til, áðrenn hann kann skoyta IM afturat navninum hjá sær. Hin fyrra IM-normin vann John Arni í Politiken Cup í fjør.



*John Arni Nilsen vann sín næsta IM-norm um vikuskiftið, og nú tykist tað bert ein spurningur um tíð, áðrenn teir báðir stavirnir kunnu setast framman fyri navn hansara í talvkappingum*

*Savnsmynd*

# Taptu landsdystin

**Føroyska talvlandsliðið, sum um vikuskiftið hevur roynt seg í Íslandi, tapti tepurt**

TALV
*Jákup Mørk*

Samlaða úrtøkan hjá føroyska landsliðnum, sum um vikuskiftið royndi seg ímóti íslendska liðnum, gjørdist eitt tepurt 11-9 tap.

Hetta í sjálvum sær er eitt úrslit, sum man vera á góðari leið, og ikki minst var tað hugaligt at síggja, hvussu væl fremstu føroysku telvararnir tykjast vera fyri.

Í mun til eitt Olympisku leikirnar, har føroyingar jú javnan taka lut, so var hetta tó ikki teir allar fremstu telvararnir, sum føroyingar sendu avstað. John Rødgaard var sostatt einasti telvarin á ferðini, sum hevur roynt seg í olympiskum høpi, men hóast hetta kanska skerdi liðið nakað, so skerst ikki burtur, at hetta eisini er við til at geva fleiri av feskastu føroysku nøvnunum altjóða royndir, sum bara kunnu koma teimum at gagni seinni.

Kanska vóru tað júst eisini royndirnir – ella mangul upp á hesar – sum kostaðu føroyska liðnum, tí tað er í øllum førum ein sannroynd, at íslendingar vóru væl stinnari enn føroyingar á aftaru borðunuum.

Hetta kann tó eisini vera við til at staðfestu, at tá talan er um avgjørda toppin, so hava okkara als onga orsøk at smæðast burtur, og tó at breiddin í toppinum enn ikki er so stór, sum tað kanska er ynskiligt, so sýna ungu nøvnini heilt víst, at her eisini er nakað í væntu.

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



Raymarine er fyrst við talgildum ekkoloddi



Hugsað tær til, at ekkoloddið hjá tær er sum ein kikari, ið er læstur, so tú bert sært klárt á 50 metra frástøðu, og alt annað er kámt. Soleiðis virkar Nýggja, talgilda ekkoloddið hjá Raymarine ikki. Vit geva tær glíðandi fokus, so tú sært klárt allastaðni í senn…

**L1260D ekkolod**
10" litskerm, sjónligt í sterkum sólljósi. v/ DSM250 HDFI box

HD FishImaging

**Gevið Gætur:**
Skipanin krevur eyðkendar Raymarine transducer.
Vel ímillum 600 W ella 1Kw.

Serkønur maður frá Raymarine verður í Føroyum frá týsdegnum til leygardagin. Ringjast kann á tel. 210 379 ella 532 379

**L1260D og DMS250**
Raymarine er aftur fyrst við nýggjastu tøknini. Siðvanda ekkoloddið er Bundið at bandbreiddini og kann tí ikki tillagast øðrum dýpi enn tí, sum Stillað er á frammanundan. Raymarine tillagar alla tíðina móttøkuna gjøgnum sjógvin, so myndin er klár, líkamikið hvussu dýpið er.




Hesar myndinar eru tiknar samstundis, við sama transducer slag . Munurin millum tað siðvanda og tað talgilda, er at tað talgilda ekkoloddi sæst betur.

BÓKHALDSVIRKI BÁTAÚTGERÐ
HJØRLEIF JOENSEN
FO-370 MIÐVÁGUR
TEL. 332 379 / 532 379

Raymarine